TÓRSHAVNAR
KOMMUNA

2. november 2022

# Vegleiðing fyri jólatrø í býlingum og grannaløgum

## 1. Endamál

Partur av játtanini til fríðkan og viðlíkahald (kt. 6212), er raðfest til at fríðka um í kommununi í samstarvi við eigarafeløg og grannaløg um jólini.

Játtanin kann veitast eigarafeløgum og grannaløgum, ið eru í Tórshavnar kommunu, og miðjað verður eftir, at játtanin verður javnt býtt millum ymisku býarpartarnar/bygdirnar.

Játtanin verður veitt sum jólatræ við fóti, sum rakstrardeildin hjá Tórshavnar kommunu stendur fyri at samskipa.

## 2. Stuðulstreytir

Játtanin kann veitast eigarafeløgum og grannaløgum, ið eru í Tórshavnar kommunu.

Umboð fyri eigarafeløg ella grannaløg kunnu søkja um at fáa jólatræ í grannalagið.

Umsøkjari eigur persónliga ábyrgd av at halda træið í tíðarskeiðinum og eisini at pynta, koyra ljós ella annað á træið í tann mun umsøkjari ynskir tað.

Um umsóknin verður játtað, verður træið við fóti sett upp á avtalaða staðseting.

## 3. Umsókn

Umsókn um at fáa jólatræ, skal vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 20. novembur á hvørjum ári.
Lýst verður við hesum á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu, www.torshavn.fo.

Umsóknin skal vera skrivlig, sendast torshavn@torshavn.fo, viðmerkjast ***"umsókn um jólatræ"***, og innihalda hesar upplýsingar:

- Eigarafelag/grannalag ið umsøkjari umboðar.
- Umsøkjari(ábyrgdarpersónur), navn, bústað og tlf nr.
- Støðd á træi ið ynskist og kort, ið lýsir hvar ynski er at seta jólatræ upp. Umsøkjari tryggjar, at ynskta staðseting er á almennari ella eigarafelags ogn, ella skrivlig váttan frá eigara um loyvi at seta jólatræ á ognina.
- Nær træið ynskist uppsett/tikið niður aftur.

Umsøkjari hevur ábyrgd av at taka pyntið avaftur trænum áðrenn træið verður tikið niður.

Tórshavnar kommuna skilar sær rætt til frítt at velja hvørjar umsóknir verða játtaðar og hvørjar verða havnaðar.